


**2. roynd. Elektromagnet við ongum jarnkjarna**

Ein streymberandi spoli við ongum jarnkjarna kann eisini draga jarnlutir at sær. Spolin virkar tí sum ein elektromagnet.

Stilla upp, sum myndin vísir. Spolin hevur 400 vindingar.

Stroy eini 10-20 klips á borðið. Tendra kontaktina og vita, um tú kanst »dustsúgva« klipsini upp av borðinum við spolanum.

Bein út eitt klips og legg tað í spolan, sum myndin vísir. Hvat hendir, tá ið streymurin verður tendraður?

___

___




Set eitt pappírspetti fyri annan endan á spolanum. Set fast við klistribandi.

Vís, at tað ber til at draga klips at pappírinum.

Hvat hendir við magnetisku atdráttarkraftini, um vit sleppa eitt sindur av jarni – t.d. eini 5 klips – niður í spolan?

___

___




Hvussu verður við atdráttarkraftini, um vit í staðin fyri klips seta jarnkjarna inn í spolan, til pappírið møtir?

___

___